# Tjúgundi biðil

Eg gekk mær í bóndans garð,
sum bóndin stóð:
"Húsbóndin, læna mær hús í nátt,
mín hest er móð!"

*Hann er ongin, ið teirra torir hevna*
*glaðir ríða mínir menn til tinga og stevna,*
*teir vilja allir taka bót,*
*hann er ongin, ið teirra torir hevna.*

2. Húsbóndin, hann setti
sín fót á gátt:
"Eg lovi ongum livandi manni
her inn í nátt."

3. Út kom bóndans hústrú,
við rokk hon spann:
"Lænar tú ikki manninum hús,
tað er stór skamm."

4. Hann tók upp sín rísakveistur,
sló hana á kinn:
"Gakk tú tær í stovuna inn,
statt har og spinn!"

5. Út kom bóndans tænastupíka,
hon treskti korn:
"Húsbóndin, læna honum hús í nátt,
tú blás í horn."

6. Hann tók upp eina eikirót,
sló hana á lend,
hon fór sær í løðuna inn,
men hon var brend.

7. Út kom bóndans tænastukall,
hann treskti malt:
"Húsbóndin, læna honum hús í nátt,
tað er so kalt."

8. "Tú hevur etið mítt kjøt og korn
og so mítt flesk.
Gakk tú tær í løðuna inn,
statt har og tresk!"

9. Út kom bóndans dóttir
í kyrtil grøn:
Faðir mín, læna honum hús í nátt
for mína bøn."

10. "So bint tú hest við løðardyr,
tú gev honum hoy.
Hvar veitst tú so vænan mann
til hesa moy?"

11. "Mín hestur kann væl úti standa
og eta hálm.
"Eg veit ongan vænari mann,
enn eg eri sjálvur."

12. "So tak tú mína onkardóttur,
før hana avstað.
Nú vart tú tann tjúgundi biðil,
ið hana bað.

13. "So tak tú mína onkardóttur,
før hana á veg
Tað verður ikki gestaleyst,
meðan hon er her!"

Tátturin er ikki nýggjur, hann er m. a. hjá Svabo.